VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, um kvøldið upp í skrið av norði. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið hósdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði, um kvøldið minkar hann vindin niður í andøvsgul av útnyrðingi. Fyrrapartin ælingur, annars turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Fyrst lot av ymsum ættum og regn av og á, sunnudagin andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 11 stig.

Fyrsti túrur hjá LS 779

– Um ikki øll høvdu staðið saman um hetta, hevði hetta ongantíð verði veruleiki, sigur Æna Reinert, deildarleiðari, sum mánadagin koyrdi úrslitið av hálvtannað ára longu innsavningini - LS 779 - upp á pláss

BUSSUR
Heri á Rógvi

Sirenan ýldi seinnapartin mánadagin, tá nýggi bussurin hjá psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum kom koyrandi til sítt nýggja fasta parkeringspláss fyri fyrstu ferð. Fitt av fólki var komið saman fyri at síggja nýggja farið, ið tey øll hava tikið lut í at fáa hendur á. Á nummarplátuni stendur LS 779. Øll vóru á einum máli um, at hetta var ein rættur fongur fyri bæði sjúklingar og starvsfólk.

Tað var 20. mars 2001, at byrjað varð at savna saman pening til at keypa ein bil til psykiatrisku deild.

– Starvsfólkið hevur higartil nýtt egnar bilar til útferðir og annað. Vit settu okkum fyri at fáa til vega ein nýggjan bil. Alt kompleksið - átta deildir – vóru saman um at savna saman peningin. Um ikki øll høvdu staðið saman um hetta, hevði hetta ongantíð verði veruleiki, sigur Æna Reinert, deildarleiðari á Psykiatriska ambulatoriinum á Landssjúkrahúsinum, ið hevur staðið á odda fyri innsavningini.

Bilurin er ein Toyota Hiace frá Reyni Service. Hann er í sokallaðari Minibuss stødd. Bilurin er nýggjasta modell frá Toyota. Hann hevur 102 hestakreftir og 2500 common-rail diesel motor.

At savna saman so mikið nógvan pening er heldur ikki heilt lætt. Tey royndu seg fyrst við nøkrum tiltøkum, m.a. einari neytamykjukapping, men hetta gav ikki nakað stórvegis. Stóra slagið gjørdist tó málningauppboðssølan, ið tey skipaðu fyri við málningum frá kendum politikarum. Beint undan valinum varð uppboðssølan hildin og eingin politikari helt seg aftur við at mála, og hugurin at keypa listarverkini var stórur, og bilurin var eitt stórt stig nærri.

Æna Reinert, deildarleiðari, og Ragnar Thomsen, sølumaður hjá Reyni Service, heilsast frammanfyri spildur nýggja Hiace bilin, sum Psykiatriskadeild hevur savnað saman pening til at keypa
Mynd: Jens Kristian Vang.

Bilurin skal til dagligt nýtast til sjúklingar, tá teir fara út – á seiðaberg, á útferð ella til ein túr niðan á Trøðna, deildin hevur og sjúklingarnir passa. Tað vera nokk mest limirnir í tí sokallaða klubbanum og ergo terapi sjúklingarnir, sum fara at nýta bilin. Um kvøldarnar fer bilurin at ganga upp á skift millum deildirnar, sum liggja í garðinum omanfyri J. C. Svabos gøtu. Ein reglugerð er longu orðað til bilin, ið væntandi verður eygnasteinurin millum gráu bygningarnar.

– Hetta er heilt ótrúligt. Málið er rokkið, og vit náddu tað í felag, sigur ein ógvuliga fegin Æna Reinert.

Tey hava longu sent takkarheilsan til øll, ið hava stuðlað. Reyni Service fær eisini eina serliga heilsan úr klubbanum fyri vælvild og hjálpsemi.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	4
Nuuk	3
Qaqortoq	5
Ammassalik	9
Saint John's	13
Halifax	17
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	9
Lerwick	12
Aberdeen	14
London	20
Tromsø	11
Bergen	15
Oslo	–
Stokkhólm	18
Keypmannah.	18
Helsinki	18
Moskva	14
Berlin	20
Warzawa	17
Kiev	20
Bukarest	29
Paris	21
Madrid	31
Róm	30
Malorca	28
Athen	30
Malta	28
Tunis	34
Beijing	18
New Dehli	36
Bangkok	30
Jakarta	32
Sydney	18
New York	30
Miami	28
Los Angeles	21
Meksikobýur	22
Panama	29
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	11

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 995 hPa millum Íslands og Føroya fer eystureftir og gevur hvassan vind av norði yvir Føroyar.

Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum grynnist og ein hátrýstryggur vestan fyri Ísland verður yvir Føroyum fríggjanáttina.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 24/06 kl. 06⁰⁰– 25/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,1°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 7,0 mm – mált frá 24/06 kl. 06⁰⁰– 25/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 70,9 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
Tlf. 213212

VESTFALLSKYRRINDI

19. juni: Mánin næstur jørðini
24. juni: Fullmáni
2. juli: Seinna kvarter/Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
26. juni	08.34	21.01	07.34	20.01	07.49	20.16	10.34	23.01	11.34	—	06.49	19.16	05.49	18.16	08.49	21.16	09.49	22.16	08.19	20.46	09.34	22.01
27. juni	09.28	21.51	08.28	20.51	08.43	21.06	11.28	23.51	00.01	12.28	07.43	20.06	06.43	19.06	09.43	22.06	10.43	23.06	09.13	21.36	10.28	22.51
28. juni	10.15	22.39	09.15	21.39	09.30	21.54	—	12.15	00.51	13.15	08.30	20.54	07.30	19.54	10.30	22.54	11.30	23.54	10.00	22.24	11.15	23.39
29. juni	11.03	23.25	10.03	22.25	10.18	22.40	00.39	13.03	01.39	14.03	09.18	21.40	08.18	20.40	11.18	23.40	—	12.18	10.48	23.10	—	12.03

5 707265 100036 >